# handVERKARIN

BLAÐ NR. 56

HAVNAR HANDVERKARAFELAG





Nevndarlimir felagsins frá vinstru: Sofus Joensen, Danial Pauli Djurhuus, Eli Brimsvík, Koos Kamminga og Hjalti Jenson.

# ÁRSAÐALFUNDURIN 30. MARS 2016

## Havnar Handverkarafelag hevði ársaðalfund tann 30 mars.

**Skráin var samb. §21 í viðtøkum felagsins:**

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing frá farna árinum.
3. Roknskapur til góðkenningar.
4. Innkomin mál.
5. Val av nevnd.
6. Val av grannskoðara.
7. Ásetan av limagjaldi.
8. Ymiskt.

*Undir pkt. 5 var nevndarval, nevndarlimirnir sum stóðu fyri vali vóru afturvaldir.*

**Í blaðnum hesa ferð:** síða


Ársaðalfundurin 30. mars 2016 . . . . . . s. 2
Heimsmeistarakapping fyri lærlingar . . . . . . s. 3
Sjónarhornið . . . . . . s. 10
Marknagilsdepilin vorðin til Glasir . . . . . . s. 12
Hvussu skulu vit brúka orðið Glasir? . . . . . . s. 18
Glasir í smiðjugerði . . . . . . s. 20



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: eli@handverk.fo · www.handverk.fo




# HEIMSMEISTARAKAPPING FYRI LÆRLINGAR

## Lærlingar úr mongum av heimsins londum taka á hvørjum ári lut í eini heimsmeistarakapping, sum verður nevnd WorldSkills.




WorldSkills er so mikið stórt tiltak, at tað mangan verður samanborið við Olympisku leikirnar – stóri munurin er sjálvandi, at í staðin fyri ítróttarfólk er her talan um eina kapping millum lærlingar. Á heimasíðuni *www.worldskills.org* er nágreiniliga greitt frá hesi kapping.

Her fara at greiða frá tí sum hevur størstan týdning.

Lat okkum fyrst nevna, at ein treyt fyri at sleppa at luttaka í eini WorldSkills kapping er, at tú skal hava vunnið eina Skills kapping í tínum heimlandi.

### Mannagongdin í Skills kappingum

Fyri at greiða frá mannagongdini í Skills




kappingum kunnu vit – *sum dømi* – greiða frá donsku Skills kappingini.

Í Danmark hevur í mong ár verið skipað fyri Skills kappingum. Á heimasíðuni *www.skillsdenmark.dk* eru fleiri umfatandi frágreiðingar um donsku Skills kappingini.

Tey sum skipað fyri endaligu Skills kappingini í Danmark seta seg – á hvørjum árið – í samband við allar danskar yrkisskúlar, tað vil siga handils- og tekniskar skúlar. Tá verður greitt lærarunum frá kappingini m.a. hvar og nær endaliga danska kappingin verður. Og so greiða lærararnir næmingunum frá kappingini. Næmingarnir kunnu skipa seg í bólkar, sum kappast ímóti hvørjum øðrum, men møguligt er eisini at luttaka sum einstaklingar.

Louise Stub, urtagarðslærlingur

„Vit skulu vísa, hvat vit kunnu og hvør er best í Danmark."

Hesar kappingar kunnu vit nevna undankappingar.

Avbjóðingin hjá næmingunum er at gera eina framsýning, sum vísir hvørjar fakligar førleikar teir hava.

Bólkarnir og einstaklingarnir , sum vinna undankappingar á hvørjum einstøkum skúla sleppa at luttaka í endaligu donsku Skillskappingini.

Tey sum vinna í endaligu kappingini gerast Danmarksmeistarar í Skills.

## Norðurlond og heimsmeistarar

Skipað verður eisini fyri eini norðurlendskari Skills kapping. Tá møtast tey, sum frammanundan hava vunnið kappingina í Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Danmark. Tey, sum vinna í hesi kapping gerast norðurlendskir meistarar í Skills.

Simon Berg, timburmanslærlingur

„Tað er feitt at arbeiða undir trýsti – adrenalinið pumpar, blóðtrýstið hækkar og tað skal bara ganga skjótt fyri seg."

Á sama hátt verður kappast millum lond í Evropa, tá er møguligt at gerast evropameistari.

Og so er bert eftir at nevna, at skipað verður eisini fyri eini heimsmeistarakapping, sum nevnd verður WorldSkills.

Vit kunnu at enda undrast á, hví Føroyar ikki luttaka í hesum sambandi, tað átti at veri eitt gylt høvi, tá talan er um at seta Føroyar á heimskortið.

Fyrsta Skills kappingin varð hildin í 1950, og í 2017 verður heimsmeistarakappingin hildin í Abu Dabi.

Nógv upplýsandi tilfar um Skills kappingarnar er at finna á: *www.worldskills.org* og *facebook.com/WorldSkills.*

## Skills Danmark 2016

Sum dømi fara vit her at greiða frá donsku Skills kappingini, sum í ár varð hildin í fleiri stórum høllum í Fredericia dagarnar 4 – 6. februar 2016.

Har savnaðust allir bólkar og einstaklingar, sum høvdu vunnið kappingarnar, sum frammanundan høvdu verið úti á skúlunum.

Lærlingar av øllum sløgum luttóku, her eru nøkur dømi: Urtagarðslærlingar, hárfríðkarar, múrarar, slaktarar, timburmenn, sosial- og heilsuhjálparfólk, verksmiðjutøknikarar og mong mong onnur, tilsamans 36 fak vóru umboðað og í hvørjum faki var eitt stórt tal av luttakarum.

## Foreldur leita sær kunning

Fyri at kunna foreldur um yrkisútbúgvingarnar varð skipað fyri foreldratiltøkum. Og tað vísti seg at fáa góða undirtøku, tí tá møttu fleiri túsund foreldur.

Tá var m.a. møguligt at hoyra uppskotið hjá unga íverksetaranum Kasper Blom um, hvussu ung finna sína røttu útbúgving.

Eitt av foreldrunum var Charlotte Enstrøm,






Nicolai Martens, tænari og dómari

„Eg hyggi nógv eftir mátunum, reinføri og allari mannagongdini fyri, hvussu tey gera drykkirnir. At tey ikke stoyta, at alt kemur í glasið og at tey ikki nýta hendurnar, men heldur tey amboðini sum eru til taks.“

Tilsamans 350 lærlingar luttóku í donsku Skills kappingini, og tey, sum vunnu sleppa seinni í ár at luttaka í heimsmeistarakappingini: „World Skills 2016“.

## Stórur hópur av luttakarum

Lærlingar av øllum sløgum luttóku, her eru nøkur dømi: Urtagarðslærlingar, hárfríðkarar, múrarar, slaktarar, timburmenn, sosial- og heilsuhjálparfólk, verksmiðjutøknikarar og mong mong onnur, tilsamans 36 fak vóru umboðað og í hvørjum faki var eitt stórt tal av luttakarum.

hon greiddi í eini viðmerking soleiðis frá: „Vit eru her fyri at fáa íblástur til ymsar útbúgvingar til dóttir okkara, sum vit hava við; hon er 18 ára gomul.“

Casper Blom, sum er íverksetari, luttók í foreldratiltakinum, hann hevði hesa viðmerkingina: „Mín boðskapur í dag hevur verið, at man bara skal leypa út í tað. Man skal ikki óttast, hvat man kann detta um á vegnum.

Julie Enstrøm, lærlingur á framleiðsluskúla

„Eg haldi at alt her er ein stór uppliving og ein góður møguleiki fyri at finna út av, hvat man vil.“

Leyp út í tað, so eri eg vísur í, at tað nokk skal eydnast á ein ella annan hátt.“

## Danski undirvísingarmálaráðharrin

Áðrenn Danska Skills kappingin varð skotin í gongd fekk danski undirvísingarmálaráðharrin Ellen Trane Nørby orðið: Í røðu síni tók hon m.a. soleiðis til: „Tað sum tit skulu í dag og tað sum tit hvønn dag gera á tykkara yrkisútbúgvingum, er ómetaliga týdningarmikið. Ikki bara fyri tykkum sjálvi hvør sær til at fáa tað fakligu útbúgvingina, sum ger tykkum til reiðar til at fáa tað arbeiði, sum tit vónandi droyma um, fyri tað lívið tit droyma um, men eisini tí, at yrkisútbúgvingarnar eru ófatiliga týdningarmiklar fyri Danmark. Nokk snakka. Nú skulu vit í gongd. Tað er nú tit skulu út at vísa, hvussu djørv tit eru. Tað er nú tit skulu út at vísa, hvussu evnarík tit eru. Tað er nú tit skulu vísa, at tit hava Skills. Og jantelógin hoyrir ongastaðni heima her. Góðu næmingar – góðan dyst.

So farvæl til jantelógina og hey til 3 dagar við einari rúgvu av hørðum arbeiði og ágrýtni.“

## 60.000 vitjandi

Omanfyri 60.000 fólk vitjaðu í høllini har lærlingarnir kappaðust í tríggjar dagar.

Fleiri enn 60 vinnuligar útbúgvingar og nógvar fyritøkur bjóðaðu seg fram at tosa um útbúgving og arbeiðsmøguleikar hjá ungum í Danmark.

Í 2016 varð kappast um 36 gullmerki, eitt fyri hvørt fak.

Thit Bjørn, karosseritøknislærlingur

„Tað er sera serstakt, tí at eingin kvinna hevur nomið sær útbúgving sum karosseritøknikari tey seinastu 15 árini, so eg eri tann fyrsta sum fær møguleikan í 15 ár. Tað gevur eitt kvinnuligt „touch“ til tingini og man kann vera vísur í, at bilarnir eru sera snotiligir, tá ið kundin fær teir aftur – á ein annan hátt enn tá ið dreingir gera tað.“



Lukas Lee Schütt Henriksen,

karosseritøknislærlingur

„Vit eru her fyri at vísa okkara útbúgving fram fyri at fáa fleiri lærlingar, av tí at vit mangla sera nógvar lærlingar í fakinum. Tað eru umleið 30 lærlingapláss tøk bara í Jyllandi.“

**Eli Brimsvík hevur hesa viðmerkingina til Skills kappingina:**

Tað var sera áhugavert at síggja hvat og hvussu alt gekk fyri seg, har umleið 350 næmingar kappaðust innan 36 ymiskar greinar. Her er einki at bíða eftir, vit eiga at fara í gongd beinanvegin at fáa tiltakið gjørt til føroysk viðurskifti.



## Kappingarstjórin

Áðrenn kappingin byrjaði beyð kappingarstjórin øllum at vera vælkomnum:

Vælkomin borgarstjórar, gestir og sjálvandi til tykkum luttakarar, sum alt snýr seg um teir komandi dagarnar.

Um eina løtu verður tað. Tað fer at surra av góðum handverki og fakligum stoltleika, geri so væl, nú er bara at fara til verka.

## Skills stafettin

Meðan lærlingarnir arbeiddu var skipað fyri eini aðrari kapping, sum var nevnd „Skills stafettin“. Hon var millum næmingar, sum gingu í áttanda flokki. Hesir næmingar høvdu frammanundan lúttikið í eini undankapping. Omanfyri 45.000 næmingar, sum ganga í 8. flokki høvdu frammanundan luttikið í kappingum kring alt landið og eru nú í finaluni og kappast í fakligum uppgávum, sum eru avbjóðandi fyri samstarv og „fingrahandverk“.

Triðja og síðsta dagin skal DM í Skills avgreiðast og vinnarar skuldi finnast.

Og í einari stórari høll, sum er á tremur við fólki, endar DM í Skills 2016.

## Forsætisráðharrin

Forsætisráðharrin, Lars Løkke Rasmusen, var millum teirra, sum fingu seinasta orðið áðrenn heiðursmerkini vóru handað og farið var at handað heiðursmerki og rigga av. Í røðu síni segði hann m.a. „Tá ið man kemur inn her og Lars Løkke Rasmusen gongur runt og sær tann stóra áhugan, sum tit hava í tykkara faki, so verði eg glaður um hjartað og bjartskygdur vegna okkara lítla land.

Óansæð hvussu tað hevur gingið tykkum, so kunnu tit øll fara heim sum fyrimyndir – hvør sær til tykkara skúla, hvør sær til tykkara part av landinum og geva íblástur til onnur ung, sum fáa gleði av at útbúgva seg, sum tit so týðiliga lýsa. Nú skulu vit til tað sum alt snýr seg um. Vit skulu jú finna útav, hvør – hóast alt – hevur klárað seg eitt vet betri og tí fær virðisløn.

**Hesi fak tóku lut í DM Skills 2016:**
Anlægsgartner, Anlægsstruktør, Automatiktekniker, Bager, Blomsterdekoratør, Brolægger, Brolægning, Bygningsmaler, Bygningssnedker, Bygningsstruktør, Cater og Smørrebrødsjomfruer, Detailhandel, Detailslagter, Elektriker, Ernæringsassistent, Flisemurer, Frisør, Glarmester, Gulvlægger, Industritekniker, Klejnsmed, Kok, Konditor, Kosmetiker, Maskinsnedker, Murer, Møbelpolstrer, Møbelsnedker, Personvognsmekaniker, Social- og sundhedsassistent, Tagdækker, Teknisk isolatør, Tjener, Tækkemand, Tømrer, VVS- og energispecialist.

*Les meira: www.skillsdenmark.dk*

*Les meira: www.worldskills.org/about/members/denmark*

# SJÓNARHORNIÐ: TÓRHEÐIN Í DALI



**Núverandi starv:**
Rørsmiður hjá Rørtænastuni

**Aldur:**
41 ár.

**Maki:**
Janni í Dali

**Børn:**
Týra 7 ár og eitt bonusbarn, sum eitur Tóri og er 8 ár.

**Handverkara útbúgving:**
Kleinusmiður.

**Læra byrjað:**
1996.

**Tekniski skúli:**
Í Tórshavn, Klaksvík og Svendborg í Danmark.

**Hvussu var læran skipað:**
Skiftandi millum skúlagongd og læruplass.

**Útlærdur:**
ár 2000.

**Sveinastykkið:**
Framleiðsla av einum brenniovni við øllum jarnarbeiði, sum hartil hoyrir, t.v.s. sveising, tilpassing o.a.

**StøRv:**
Eftir at eg var útlærdur arbeiddi eg sum sveinur hjá Ken Maskinfabrik í Danmark. Afturkomin til Føroya arbeiddi eg eitt tíðarskeið hjá Demich. Og nú havi eg í nøkur ár verið í starvi hjá p/f Rørtænastan.

**Frítíðarítriv:**
Eg havi eina fína samling av larmandi arbeiðsamboðum, sum skulu passast, so ofta verða ymiskir lutir bygdir um. Mær dámar væl at brúka hugflogið, oftast er tað endurnýtsla av gomlum brúktum lutum, sum annars høvdu endað á ruskplássinum, sum verða umbygdir. Haraftrat so verður ofta ein kjøtbiti ella báðir tveir blakaðir á grillina, tá ið hugurin er til tað, óansæð hvussu veðrið skikkar sær.

**Besta bók:**
Lesi ikki nógv, men Dean Koontz, „Eksperimentet“ er ein bók sum mær dámdi væl.

**Besti sangur:**
Alt við Nik&Jay, nei tvætl … eri nokk mest til góðar rokk klassikarar sum Led Zeppelin, Deep Purple, AC/DC og aðrar góðar bólkar frá 70-80unum.

**Besti Filmur:**
Minnist ikki allar eg havi sæð, men eg minnist at Die Hard var sera góður. Annars havi eg ikki nakran favoritt, tí eg eri ikki liðugur enn við at hyggja eftir filmi.

**Besti sjónleikari:**
Bruce Willis!

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:**
Ja, meðan eg var í læru, var eg 10 dagar í Týsklandi fyri at seta eitt sement virki upp. Umleið eina viku eftir at verða komin aftur til Danmarkar hoyrdi eg, at virkið var brent niður.

**Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:**
Eg kenni ikki allar handverkarar, men eg kann nevna Eirik Elisson. Hann er ein sera dugnaligur handverkari, sum hevur fingið okkurt av sínum handverki við í Guinness Rekordbók.

**Hvør heldur tú hevur myndað tín persón mest:**
Mamma mín, og abbi.

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:**
Nostradamus visti nokk so nógv.

**Hvør er tín størsta fyrimynd:**
Bruce Willis … tvætl, tað er mamma sum altíð er har fyri meg.

**Fartelefon:**
Samsung Duo

**Telda:**
Toshiba

**Bilur:**
Citroen C5 diesel.

**Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Spyr meg tá eg havi fingið hana … tvætl, hon er fín.

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Hon er sera fín.

**Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:**
At halda seg updateraðan. Menning av amboðum og tilfari gongur rúkandi skjótt. Ofta kemur fyri at arbeiðast skal við ókendum amboðum ella lutum.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Matur frá konuni.

**Hvat kann øsa teg:**
Konan er nokk tann sum klárar tað best, men fitt er hon.

# MARKNAGILSDEPILIN VORÐIN TIL GLASIR

**Talan er um nýggjar tíðir í føroyska skúlaverkinum, tað gjørdist ítøkiligt, tá tíðindi bórust, at Marknagilsdepilin hevði fingið nýggja vakra navnið Glasir.**

Og tá flutt verður inn í nýggja skúlan, verður tað samstundis eisini endin á Studentaskúlanum, Handilsskúlanum og Tekniska Skúla í Tórshavn.

## Størsti skúli í landinum

Nógvir hundrað næmingar fara at hava sína dagligu gongd á skúlanum, ið verður størsti skúli í landinum.

Umframt tær útbúgvingar, ið teir tríggir skúlarnir frammanundan hava bjóðað, so kann væntast, at Glasir kann bjóða næmingum nýggjar útbúgvingarmøguleikar. Hetta kemst av at møguligt verður at gagnnýta teir eyka møguleikarnir, ið tað gevur, tá skúlarnir við teirra lærarum, vitan og førleikum, verða lagdir saman.



*Bogi Bech Jensen, rektari á Glasi.*

Á skúlanum verður nakað til tey bókligu, tað verður nakað til tey handaligu, tað verður nakað til tey, ið bera brek, tað verður nakað til miðnám, og tað verður nakað til víðari lestur. Glasir fer at hava okkurt til øll, greiðir rektarin Bogi B. Jensen frá.

## Nýggjar samansetingar

Framyvir verður munandi lættari at seta saman praktiskar og bókligar útbúgvingar, og tí kann skúlin leggja størri dent á t.d. íverksetan og kreativitet. Tað kemur at líkjast teimum donsku EUX útbúgvingunum, ið er ein spennandi útbúgving, har handverkaraútbúgvingin verður sett saman við studentsprógvi. Ein slík útbúgving tekur eini fýra til fimm ár.

Hóast lagt verður upp til broytingar, ið líkjast einari kollvelting av føroysku skúlaskipanini, so kann einki gerast uttan vælsignilsi frá teimum hægru maktunum, tað vil siga skúlamyndugleikunum.

Skúlin hevur ymiskar ætlanir, sum lógin leggur upp til, men onki nýtt kann setast á stovna uttan landsstýriskvinnan í mentamálum tekur undir við tí.

## Alternativ til Fróðskaparsetrið

Hóast teir tríggir skúlarnir, ið nú





verða til Glasir, mestsum einans hava bjóðað handaligar útbúgvingar og útbúgvingar á miðnámsstøði, so hevur Føroya Handilsskúli síðstu árini bjóðað ymiskar hægri útbúgvingar. Tað er ein leistur, ið rektarin á Glasi, hevur í hyggja at halda fram og enntá víðka til at fevna um fleiri útbúgvingar.

Glasir er ikki avmarkað til miðnámsútbúgvingar. Vit eru ein skúli, ið millum annað bjóðar miðnámsútbúgvingar. Ætlanin er framyvir at gera meira burturúr hægri lesnaði, so at Glasir kann gerast eitt alternativ til Fróðskaparsetrið, tá fólk ynskja at taka eina hægri útbúgving.

Tað trýtur heldur ikki við møguleikum, tá rektarin verður spurdur um, hvørjar útbúgvingar hann hevur í huga.

Tað eru fleiri møguleikar, tá tosað verður um hægri lestur. Føroya Handilsskúli, Glasir, hevur síðani í summar bjóðað marknaðarførslubúðskap, og vit hava júst kunngjørt fíggjarbúskap sum nýggjastu útbúgvingina.

Síðani eru tað eisini tær meira praktisku útbúgvingarnar. Har bjóða vit frammanundan framleiðslutøkni og Byggitøkni. Harumframt eru tað parttíðarútbúgvingarnar, ið vit bjóða. Harímillum er HD, ið vit hava bjóðað í nógv ár, sera vælumtókt, og er tilsamans 120 ECTS. Undirtøkan fyri okkara leiðaraútbúgving, ið er á diplom støði, er eisini sera góð.

## Mugu hugsa nýtt

Í ein stóran mun verður byrjað av nýggjum, tá bygningurin í Marknagili stendur klárur til skúlaársbyrjan. Tað gevur eisini møguleikar at hugsa nýtt og øðrvísi.

Hvørjar útbúgvingar kunnu vit millum annað bjóða innan list, íverksetan og høvuðsvinnuna spyr rektarin? Við politiskari vælvild hava vit óendaligar møguleikar, og kunnu seta útbúgvingar saman við praktiskari læru, starvsvenjing og bókligari læru. Møguleikarnir eru endaleysir.

Sum nakað heilt nýtt, so hevur rektarin ein dreym um at bjóða út masterútbúgvingar á nýggja skúlanum. Har er tað serliga eitt øki, ið hann metir at Glasir kann veita nakað nýtt í.

Tað er ein stórur tørvur á leiðarum og leiðsluútbúgvingum í Føroyum. Tey flestu, ið eru komin í eitt leiðarastarv í Føroyum, hava lítlan og ongan møguleika at steðga á, og flyta uttanlands at taka eina útbúgving. Á tí økinum síggja vit góðar møguleikar at fara í samstarv við Fróðskaparsetur Føroya ella onnur universitet og bjóða masterútbúgvingar í leiðslu.

## Samstarv við Fróðskaparsetri

Eitt samstarv við Fróðskaparsetur Føroya um hægri útbúgvingar er eisini ein møguleiki, ið aktivt verður arbeitt við.

Vit arbeiða frammanundan við ymiskum øðrum, millum annað







búskaparútbúgvingar, har samstarv er millum okkum og Fróðskaparsetrið. Har royna vit at fáa greiðu á, hvat vit kunnu veita nýggju útbúgvingini á Setrinum, sigur rektarin.

Pedagogikum er eisini nakað, ið hugt verður eftir. Tað er eitt fak, ið flestu av okkara lærarum hava tørv á, tí tá tey byrja at undirvísa, kenna tey sítt egna fak, men hava ikki nakra serliga vitan um undirvísing. Tí er neyðugt hjá teimum at taka pedagogikum, ið er grundað á donsk viðurskiftir. Okkara ynski er, at tann útbúgvingin verður føroysk. Á tann hátt fáa lærararnir undirvísing í eini útbúgving, ið tekur støði í føroyskum viðurskiftum.

## Samskipa tær bókligar og handaligu

Seinastu tíðina hevur nógv kjak verið um, at boðskapurin um, at ein hægri útbúgving er besta leiðin fyri tey ungu, møguliga hevur verið skeivur. Í norðurlondum er nevniliga stórur eftirspurningur eftir handverkarum í dag, meðan arbeiðsloysi er millum akademikarar, og í Føroyum kann ein handverkari tjena líka nógv sum flestu akademikarar.

Á Glasi verða handverkara- og tær bókligu útbúgvingarnar savnaðar í sama bygningi, og tí kunnu útbúgvingarnar samskipast og tað kann geva nýggjar møguleikar og nýggjar útbúgvingar.

## Handverkarar tengdir at konjunkturum

Eg hevði ynskt at man sá fleiri møguleikar við handverkaraútbúgvingini. Sum nú er, so síggja nógv ung hana sum nakað endaligt, og sum eina útbúgving tengd at konjunkturum í samfelagnum. Tað ber til at gera hana meira lokkandi um man veitir møguleikar fyri víðari læru og spesialisering.

Í Sveis er til dømis møguligt at seta saman eina handverkaraútbúgving við verkfrøðilíknandi fakum. Soleiðis fáa handverkarar møguleika fyri víðari spesialisering og skeiðum restina av teirra lívi, og harvið gerst útbúgvingin ikki so endalig.

## Skal fevna øll

Glasir fer í summar at bjóða eitt nýtt slag av útbúgvingum til teirra, ið bera brek. Á tann hátt ynskir skúlin at hjálpa teimum út á arbeiðsmarknaðin, við at geva teimum prógv upp á ymiskar førleikar.

Talan er um nakrar útbúgvingar, ið kallast Open College Network, ið






er stílað til fólk við serligum tørvi ella teimum, ið bera brek. Tað handlar um at veita teimum nakrar førleikar, ið tey kunnu brúka í samfelagnum. Fígging er longu fingin til vega og skúlin tekur ímóti níggju næmingum, ið kunnu velja ímillum bilar, timbur ella klædnadeild.

## Ítøkiligt nýtt

Onkur kann til dømis læra at skifta dekk, og so fáa prógv upp á tað. Eg veit, at um veturin hava bilasølur so nógv at gera við at skifta dekk, at tey ikki fáa tíð til nógv annað. Við hesum kunnu vit útbúgva fólk til ta uppgávuna, og so fáa tey eitt veruligt arbeiði í samfelagnum, og ikki bara eitt fiktivt eitt.

Nýggju karmarnir fara eisini at lætta um hjá teimum næmingum, ið hava sína dagligu gongd á skúlanum, men stríðast við lesitrupulleikar.

Og skúlin skal í nógv størri mun hjálpa orðblindum. Tá vit hava ein so stóran skúla, ber til at taka tey úr teimum stóru fakunum, so sum føroyskt og enskt, og taka tey í ein flokk fyri seg. Tað ger man aðrastaðni, og tað vísir seg at vera betri.

Inklusión er góð, men onkutíð hava fólk tørv á eitt sindur av hjálp. Hetta er eitt øki, ið vit eru eftirbátar á, men mín vón er, at Glasir megnar at lofta teimum, ið stríðast við hesum, so at tey fáa neyðugu hjálpina skjótt.

# HVUSSU SKULU VIT BRÚKA ORÐIÐ GLASIR?



### Hesi orð hava givið hugskotið til navnið Glasir

Glasir merkir glæma, glitur, neisti, geisli, glansur ella líknandi. Glasir er træið í Glasislund, sum stendur beint uttanfyri Valhøll, har gudar, kongar, hetjur og onnur, sum deyð eru í bardaga, búgva.

Í Glasislund rennur áin Thun. Træið sjálvt er tiltikið og tað vakrasta av øllum og verður borið saman við Yggdrasil.

### Tá ið vit brúka bókstavin á:

Mælt verður til at nýta bókstavin *á* í sambandi við tað at arbeiða og vera lesandi/næmingur á skúlanum. **Dømi:** Eg eri lærari *á* Glasir. Eg eri lærlingur *á* Glasir.

**Á sama hátt sum vit siga:** at fara *á* studentaskúla, *á* handilsskúla og *á* tekniska skúla.
**Og hægri lærustovnar verða vanliga umrøddir við á:** at fara *á* universitet og at fara *á* Setrið at lesa.

### Tá ið vit brúka bókstavin í:

Sjálvsagt kann bókstavurin *í* eisini verða nýttur, men tá snýr tað seg meiri um ítøkiliga staðið; t.d. Vit eru *í* Glasi og gera okkum líðug við framløguna.

### Tá ið bæði í og á kunnu brúkast:

Hitaskipanin *á/í* Glasi er sera framkomin og hin einasta av sínum slag í Føroyum

Fyrisetingarnar hjá og frá verða eisini nýttar, men tær stýra hvørjumfalli og eru ikki so truplar at fáast við.

**Dømi:** Ein kunngerð *frá* Glasi:
*Frá* Glasi – allir fyrstaársnæmingar møta mánamorgunin 22. august kl. 9. 2. árs- og 3. ársnæmingar møta týsdagin 23. august kl. 8.10 og hava vanliga skúlagongd.

**Dømi:** Ein útferð:
Gongutúrurin byrjar á Lambafelli, og so verður gingið í haga og eftir gøtum gjøgnum Havnardal og heim *á* Glasir, har borðreitt verður við onkrum góðum.

### Onnur dømi:

1. Glasir hevur eitt ógvuliga samansett læraralið.
2. Vit vilja, at fólk síggja Glasir sum ein framkomnan skúla við útbúgvingartilboðum til fleiri samfelagsbólkar.
3. Bussleið koyrir úr miðbýnum, úr Hoyvík og av Argjum til Glasir/út á Glasir/niðan á Glasir/yvir á Glasir Hetta valdast, hvar ein býr, og hvaðan ein kemur, men til eigur at vera ein íðuliga nýtt fyriseting í hesum sambandi.
4. Glasisnæmingar/næmingar á Glasi hava enn eina ferð luttikið í altjóða kapping í marknaðarførslu við góðum úrsliti.
5. Næmingar á Glasi hava arbeitt við spennandi verkætlan um grøna orku.
6. Leiðslan á Glasi arbeiðir støðugt við mennandi og avbjóðandi arbeiðsuppgávum og framhaldandi eftirútbúgving.
7. Starvsfólk hjá Glasi arbeiða støðugt við at betra og dagføra útbúgvingartilboðið.
8. Glasir er karmur um mangt mentanarvirksemi bæði í skúlatíð og uttan fyri vanliga skúlatíð.

**Glasir verður bent sum eitt nú *Beinir, Birgir, Ægir og Mjølnir***

| Hvørfall | Glasir |
|---|---|
| **Hvønnfall** | Glasir |
| **Hvørjumfall** | Glasi |
| **Hvørsfall** | Glasis |



# GLASIR Í SMIÐJUGERÐI

**Glasir Smiðjugerð hýsir teknisku yrkisútbúgvingunum. Tekniskt Yrkisnám er grundarlag undir nýggjum møguleikum hjá teimum, ið velja eina tekniska yrkisútbúgving.**

Her verður dentur lagdur á trivnað, kreativitet og læring. Umhvørvið á Glasi er dynamiskt og fjølbroytt. Undirvísingin er í flokkum, sum fylgjast ávís skeið. Ert tú í læru og hevur lærusáttmála, fevnir skúlagongdin á Tekniskum Yrkisnámi um 55 vikur. Hevur tú ikki lærusáttmála kanst tú taka Tekniskt Yrkisnám uppá eitt ella tvey ár. Eftir tvey ár á Tekniskum Yrkisnámi hevur tú møguleikan fyri framhaldandi lestri í Føroyum og uttanlands, har tú fært góðskrivað part av útbúgvingini. Glasir Smiðjugerð bjóðar teknisku yrkisútbúgvingarnar klædnaatstøðingur, tilvirkisatstøðingur, bilsmiður, elektrikari, húsasmiður ella snikkari, hárfríðkari og metalútbúgving við sergrein, umframt serbreyt innan handverksyrkið.

### Hárfríðkarar

Hárfríðkarar fáast sjálvandi mest við hárviðgerð, men læra eisini alt um vakurleikarøkt, og hvat tað inniber at reka eitt virki, so sum búskap, kundarøkt, sálarfrøði og mangt annað. Arbeiðið er fjølbroytt, tí mótin skiftir sera ofta. Hárfríðkarar starvast mest á hárstovum, tó eisini innan films- og sjónleikaraheimin og á sjónvarpsstøðum.

Eftir 1. ella 2. skúlaskeið, sum er 20 vikur hvørt, kanst tú fara í læru.



### Elektrikarin

Elektrikarin arbeiðir við innlegging av sterk- og veikstreymi í t.d. sethús, skrivstovur, virki, skúlar og í skip. Hetta kann fevna um ljós, hita, motorar, elektroniskar stýringar til flutningsskipanir og framleiðslueindir. Eisini fæst el-innleggjarin við tele-, teldu- og antennuinnleggingar og forritan av elektroniskum stýringum. Eftir 1. ella 2. skúlaskeið, sum er 20 vikur hvørt, kanst tú fara í læru. Um tú ikki hevur sáttmála, kanst tú halda áfram á 4. skúlaskeiði og fara til víðari lestur.

### Bilsmiðútbúgvingin

Bilsmiðútbúgvingin er ein spennandi og avbjóðandi útbúgving. Í dag er tað ikki einans bilin, ið ein lærlingur skal kenna, men eisini øll tey framkomnu elektronisku hjálpartólini. Tól til at kanna bremsur, útlát, hjólsporing, elektriskar skipanir o.s.fr. Eftir 1. ella 2. skúlaskeið, sum er 20 vikur hvørt, kanst tú fara í læru. Um tú ikki hevur lærupláss, kanst tú halda áfram á 4. skúlaskeiði (innan metal- og eløkið) og fara til víðari lestur.

### Húsasmiður ella snikkari

Húsasmiðurin fæst við at byggja sethús og virkisbygningar og onnur byggiarbeiði. Arbeiðið fevnir um m.a. forskalling, gólv, útveggir og takverk. Eisini arbeiðir húsasmiðurin við at bjálva, klæða, seta vindeygu og hurðar í, umframt uppseting av køkseindum og øðrum lidnum bygningslutum.



Snikkarin arbeiðir serliga við træi og ger hurðar, vindeygu og innbúgv. Á skúlanum lærir tú at arbeiða við maskinum og amboðum. Harafturat lærir tú um ymiskt tilfar, ið skal brúkast. Í løtuni verður 1. skúlaskeið, sum er 20 vikur, tikið á Glasi Smiðjugerði; restin má takast í Danmark.

Eftir 1. ella 2. skúlaskeið, sum er 20 vikur hvørt, kanst tú fara í læru. Um tú ikki hevur lærusáttmála, kanst tú halda áfram á 4. skúlaskeiði og fara til víðari lestur innan byggitøkni.

### Metalútbúgvingarnar

Metalútbúgvingarnar við sergrein í útbúgvingini innan metal læra teg grunnleggjandi smiðju- og maskinarbeiði. Eftir 1. ella 2. skúlaskeið, sum er 20 vikur hvørt, kanst tú fara í læru innan eina sergrein. Um tú ikki hevur sáttmála, kanst tú halda áfram á 4. skúlaskeiði og fara til víðari lestur

Sergreinirnar innan metal eru maskinsmiður, kleinsmiður, rustfastur kleinsmiður, rørsmiður, rør- og blikksmiður og sveisari. Skúlagongdin er 1. og

2. skúlaskeið og sergrein. Tilsamans 55 vikur. Lærutíðin er 4 ár.

Skúlagongdin hjá sveisarum er øðrvísi; hon er 1. skúlaskeið, ið er 20 vikur og sergrein í 15 vikur. Tilsamans 35 vikur. Lærutíðin er 2 ½ ár.

Klædnaatstøði er ein 2 ára útbúgving til tín, sum ynskir at menna tíni kreativu evni innan mótaheimin. Vit bjóða eina spennandi og kreativa útbúgving, har tú fær hollan kunnleika innan klædnaframleiðslu. Vit arbeiða m.a. við sniðgeving, seyming, konstruktión og mótasøgu.

Sum útbúgvin klædnaatstøðingur hevur tú møguleika at lesa víðari til Designteknolog, Klædnahandverkara ella tú kanst velja at arbeiða á seymistovu, vera sjálvstøðug/-ur vinnurekandi o.a.

**Almennar lærugreinir**

*Føroyskt C*
*Enskt C*
*Støddfrøði C*
*Stílmenning C*
*Myndlist C*
*KTS C*

**Yrkislærugreinir**

*Framleiðslumenning og kalkulatión*
*Vøruframleiðsla*
*Maskinhandfaring og framleiðsla*
*Seymivenjing*
*Skjalprógvan*
*Modelkonstruktión*
*Tilfarslæra*
*Design*
*Illustrator.*

*Glasir Smiðjugerð hevur gjørt samstarvsavtalu við KEA í Keypmannahavn um víðari lestur.*



## Tilvirkisatstøði

Útbúgvingin er ein 2 ára grundútbúgving, sum tekur støði í handverkstraditiónum innan tóvirki.

Útbúgvingin kann birta upp undir skapandi hugin hjá fólki, so tey fáa eina grundvitan um handverk, tilfar og møguleikararnar at framleiða. Fyrst og fremst verður tilfar úr føroyskum náttúrutilfeingi nýtt. Hetta er ein útbúgving, har vit koma inn á framleiðsluhættir at virka ull, skinn og annað.

Endamálið er at menna vitan og kunnleika innan økið, sum kann stimbra um møguleikan fyri einari nýggjari framleiðsluvinnu innan okkara tilfeingi. Hetta er ein góð grundvitan at ogna sær, um ein ynskir at søkja víðari á eitt nú skúlar innan handverk og sniðgeving.

**Almennar lærugreinir**

*Føroyskt C*
*Enskt C*
*Støddfrøði C*
*Kunningartøkni C*
*Myndlist C*
*Stílmenning C*

**Yrkislærugreinir**

*Búfrøði*
*Tilfarslæra*
*Søga innan tóvirki og sniðgevan*
*Rávørufrálæra (øll lið innan handfaring av ull, skinni v.m.)*
*Tóvirkistól (veva, binda, tøva, bregda v.m.)*
*Framleiðslumenning (sniðgeving, vørumenning v.m.)*

Avtalur eru gjørdar við Myndlistaskólann í Reykjavík, Tækniskólann í Reykjavík um víðari lestur innan Diplomanám.

## Serbreyt innan Handverksyrkið

– eitt 4 ára skúlatilboð til næmingar við serligum tørvi

Grundhugsjónin er at inkludera næmingar, sum ynskja at nema sær ávísar førleikar innan handverksyrkið, men ikki megna at fáa sær fulla útbúgving í verandi útbúgvingarskipan. Talan er um næmingar, sum fara út í vard størv.

Næmingunum stendur í boði at menna sosialar, yrkisligar og persónligar førleikar, treytað av førleikum og tørvi teirra. Undirvísingin byggir á læruætlan, sum er gjørd til einstaka næmingin.

Næmingurin velur eina av trimum ymiskum yrkisgreinum, við einum felagsfakið innan tænastuøkið og mentan. Yrkisgreinirnar eru innan timbur, klædnaatstøði og bil.

Serbreytin endar við serstøkum prógvi, sum byggir á OCN-skipanina, sum er lýst í Tilmæli um serliga skipað miðnám, sum heildartilboð til ung við serligum tørvi.

Almennu upptøkutreytirnar eru ikki galdandi fyri serbreytina. Ein upptøkubólkur stendur fyri upptøkuni, og umsøkjarar vera bodnir til upptøkusamrøðu. Fyri at kunna veita best møguligan stuðul til einstaka næmingin, er umráðandi, at skúlin fær viðkomandi skjøl, so sum sernáms- og sálarfrøðiligar frágreiðingar.

Á Glasi Smiðjugerði verður pláss fyri 9 næmingum á Serbreytini.

# LESTRAR- OG ÚTBÚGVINGAR BYGNAÐUR




Eik
Vinnukundadeildin í Eik
Tryggja tær arbeiðsfrið
Fá tíð til tað, sum hevur týdning fyri tína fyritøku, við góðari og skjótari ráðgeving.
Sverri er vinnukundaráðgevi í Eik.
Sum partur av byggivinnutoyminum hevur hann innlit í og áhuga fyri tørvinum og dagligdegnum hjá kundum sínum.
Vit arbeiða eftir meginregluni um, at góð ráðgeving og skjótar svartíðir tryggja, at tín tíð og tín orka verða brúktar til títt virksemi.
www.eik.fo tel. 348000


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir grannskoðarar


gimmix.fo
– alskyns reklamulutir
Tel. 224692 & 211083


SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR
www.tst.fo
skapandi umhvørvi
Tekniski Skúlin
.... ein virkin og góður samstarvsfelagi
Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling
• vit seta lærlingin í miðdepilin
• vit nøkta tørvin hjá vinnuni
• vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika
Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið
Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo


»Framtíðin er tryggjað«
SENDISTOVAN
Ein trygg framtíð við Lív
Hjá Lív gert tú eitt trygt innskot í tína framtíð. Hetta er tí, at hjá okkum er tað styrkin í felagsskapinum, ið gevur tær møguleikar og fitt av peningi um hendi, tá ið tú røkkur eftirlønaraldri.
Sum kundi hjá Lív ert tú í tryggum hondum. Vit geva tær eina dygdargóða og skilagóða ráðgeving, sum tekur støði í júst tínum tørvi.
www.liv.fo
Innlit í útlit
Lív


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av
lágorkutermorútum,
u-virði niður í 0,4.
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466


rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión


www.mest.fo
TÆNASTA KRING ALT LANDIÐ
FILTUR
HYDRAULIKKUR
EL-VØRUR
Vitja sølubúðir okkara í
Runavík (tel. 301190),
Havn (tel. 301100) og á
Skála (tel. 301178)
MEST
– álítandi loysnir



COINTRA
Linde Gas
AGA
FØROYA GASSØLA
Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass
Upplatingartíðir :
mána, -fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
www.gassola.fo




aquatherm
BAXI
ROYALSCANDINAVIAN
VØLUND VARMETEKNIK
DEMICH P/F
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn
Tel 200 300
Fax 200 301
demich@demich.fo
HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA
HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ
demich
Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345
Tí velja handverkarar Demich
■ Vit veita bestu ráðgevingina
■ Vit umboða dygdarvørur
■ Vit hava kappingarførar prísir
■ Vit hava góða kundatænastu
■ Vit hava døgntænastu
■ Vit hava framkomnar blikksmiðju
(Har vit kunnu tilevna inndekningar upp til 3 m)
www.grafikmaster.fo
demich
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet
Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo







Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
SLÆTTANESGØTA 9 · 110 TÓRSHAVN · TEL. 31 99 92 / 21 99 92 · TMV@OLIVANT.FO

Húsavarðartænastan
Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@hvt.fo | Tel. 29 00 29



OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðaruppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.





Reinsa við turr-ísi

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing. Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.



Betong-saging

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm. Ring og hoyr nærri.





*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...*

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA
BALSLEV







**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo



2X3
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

AMBOÐ ARBEIÐSKLÆÐIR
TILFAR BESLØG MASKINUR



*Júst tá tú stendur
og manglar tað*

↘ betri.fo



VIÐGERÐARTRYGGING

# Slepp undan **bíðilistum**

FÁ VIÐGERÐ INNAN 10 ARBEIÐSDAGAR

## Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.

**Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.**

Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

**Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.**





TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón